Kyndil-Tjaldur 28-21 (13-8):

Kyndil leyst úr botninum

Við einum tryggum sigri á Tjaldri, staðfesti Kyndils-kvinnurnar, at tær ikki ætla sær at liggja fastar í botninum í vetur

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Talan var um fyrsta veruliga botndystin í kvinnudeildini, tá Kyndil mikukvøldið tók ímóti Tjaldri í Sunset kappingini.

Liðini bæði vóru niðast á talvuni, og tó at Kyndil hevði eitt stig, so var einki at ivast í, at tær vildu hava bæði stigini hesaferð, soleiðis at veruligur munur kundi skapast til botnin.

Tað var tó dyggur smeitur, at Lotte Sørensen ikki var tøk hjá liðnum. Hon hevur drigist við bruna í hælinum, og setti seg tí ikki føra fyri at spæla. Hinvegin hevði liðið nú Guðrun í Lágabø aftur í málinum, og tað skuldi vísa seg sum góður styrkur.

Hjá Tjaldri hevur mest týðandi leikarin verði

Við hvørt gjørdist Kyndilsverjan nakað opin, tá tær royndu at stressa Tjaldur, men samanlagt gav valda uppleggið til dystin nøktandi úrslit hjá teimum grønu
Mynd: Álvur Haraldsen

Vesna Tomajek, men eisini hon stríddist við skaða, og tí varð hennara lutur í dystinum avmarkaður til tær báðar ferðirnar, sum hon kom inn at skjóta brotskøst.

Settu ferð á

Og Kyndil sýndi skjótt, at tað skuldi gerast tær, ið tóku stigini fyri dystin. Ferðin varð sett upp frá fyrsta bríksli, soleiðis at trýstið á mótstøðuna gjørdist størst møguligt.

Ofta hevur slík ferð givið liðnum alstórar trupulleikar, men hesaferð megnaðu tær sera væl at gera tað einfalda. Spæla upp á krossini, har Randi Wardum slapp framat til skot, og so byrjaði munur at koma í. Eisini tí Kyndil í verjupartinum royndi at stressa Tjaldri. Nakað sum kanska kostaði okkurt málið, tá holini í verjuni gjørdust ov stór, men samanlagt tóktist talan tó vera um skilagóða avgerð.

Talan gjørdist sjáldan um nakra veruliga útklassering av Tjaldrinum, men sum dysturin leið, so gjørdist gongdin alt meira ein staðfesting av, at í løtuni er Tjaldur veikasta liðið í deildini. Í øllum førum so leingi, sum liðið ikki hevur styrkt seg við teimum útlendingum, sum felagið sigst hava í umbúna.

Hjá Kyndli var talan hinvegin um hugaliga staðfesting. Hóast mótstøðan var minni, enn hon so ofta hevur verið, so megnaði liðið sera sannførandi at seta seg á dystin, og hetta fær ikki verið annað enn gott fyri sjálvsálitið. Fæst verjuspælið so eisini upp at koyra, kann væl verða, at Kyndil eisini kann arga okkurt av hinum feløgunum av og á.

FAKTA

Kyndil-Tjaldur 28-21 (13-8)
Málskjúttar
Kyndil: Randi Wardum 13(5), Linda Weihe 6, Súsanna Petersen 3, Ann Mari Wang 2, Hildur Mikkelsen 2, Kari-Ann Petersen 1, Anja Midjord 1
Tjaldur: Mona Langgaard 8(5), Jacoba Langgaard 4, Anni Højgaard 4, Kristine Ellingsgaard 2, Anna Hansen 1, Vesna Tomajek 1(1), Heidi Heinesen 1
Brotskøst: Kyndil 7, Tjaldur 7
Útvísingar: Kyndil 3, Tjaldur 3
Dómarar: Pole Hansen & Hartvig Joensen. Gjørdu ikki uppgávuna truplari enn neyðugt

FM - finala - og NM úttøka - í talvi fyri ung 2004

Talvsamband Føroya skipar fyri FM-finalu í talvi fyri ung í Argja skúla, leygardagin 27. november 2004 (kl. 10.00 til uml. kl. 17.00).

Kappingin er skipað í 5 bólkum:
A - bólkur: Telvarar føddir 1985-87
B - bólkur: Telvarar føddir 1988-89
C - bólkur: Telvarar føddir 1990-91
D - bólkur: Telvarar føddir 1992-93 og
E - bólkur: Telvarar føddir 1994 og seinni

Í finaluni luttaka 8 í hvørjum aldursbólki og allir telva í móti hvørjum øðrum - t.v.s. 7 umfør. Umhugsunartíðin er 1/2 tími í part til hvør talvið.

Úttøkukappingar til finaluna hava verið í november mánað í Miðvági og á Oyrarbakka. 8 telvarar í hvørjum bólki, sum samanlagt hava klárað seg best í hesum báðum kappingum, hava kvalifiserað seg til finaluna. Í hvørjari úttøkukapping luttóku uml. 60 børn og ung.

Umframt at gerast føroyameistari í sínum aldursbólki, luttekur viðkomandi í Norðurlandameistaraskapinum í skúlatelving, sum í ár verður í Oslo í

Tað er ikki sørt, at telvarar úr Sandavági hava gjørt um seg í yngra endanum seinnu árini

Noregi í februar mánað 2005. Nummar 2 í hvørjum bólki luttekur somuleiðis í NM-kappingini. T.v.s. at Talvsambandið/Føroyar luttekur við 10 telvarum - luttøkutalið er sostatt ájavnt tí onnur norðurlond luttaka við. Norðurlond skiftast um at halda kappingina. Í 2003 var kappingin í Føroyum, meðan kappingin í februar mánaði í ár var í Svøríki.

Talvsambandið miðar eftir at skipa fyri miðvísari venjing í desember/januar mánað fyri teimum sum kvalifiserað seg til NM.

Niðanfyri er úrslitatalvur frá úttøkukappingunum fyri 8 teir bestu, sum luttaka í finaluumfarinum. Harumframt er viðmerkingar atknýttar.

A - bólkur: Telvarar føddir 1985-87
Úttøkukappingar hava ikki verið í hesum bólkinum. Í skrivandi stund er ikki greitt hvør fer at luttaka í finaluni. Tilmeldingarfreistin til kappingina er hósdagin 25. november. Favorittur at vinna bólkin er uttan iva Olaf Berg, úr Havnar Telvingarfelag. Olaf er rættiliga sterkur telvari, hevur luttikið í NM í fleiri umførum og vann hann bronsu tá kappingin varð hildin í Svøríki. Aðrir sum væntast kunnu gera seg galdandi um NM plássini eru Rani Baldurson úr Klaksvíkar Talvfelag og Sjúrður Thorsteinsson av Tvøroyri, sum telvar fyri Vestmanna Talvfelag. Men eisini aðrir kunnu sjálvsagt gera um seg í bólkinum - 8 teir hægst rataða sum meldað seg hava rætt at luttaka.

B - bólkur: Telvarar føddir 1988-89
Verandi føroyameistarin í bólkinum Jón Gregersen úr Sandavágs talvfelag vann tepurt undankappingarnar samanlagt, bert hálvt stig frammanfyri Rógva Mortensen úr Havnar Telvingarfelag. Hesir báðir luttóku í NM kappingini seinast og ábendingar eru um at hesir ætla sær at endurtaka bragdið. Tó vístu serliga Henry Berg úr Havnar Telvingarfelag og Dávur Johannesen úr Róki, í undankappingini sum var á Oyri, at hesir eru sinnaðir at blanda seg uppí kappingina. Áhugavert er eisini, at endurstovnaða Eiðis Talvfelag hevur Høgna Sólsker í finaluni. Eiðis Talvfelag luttók fyri fyrstu ferð í seinnu undankappingini á Oyrarbakka og heili 15 telvarar úr felagnum luttóku.

C - bólkur: Telvarar føddir 1990-91
Helgi D. Ziska hevur vunnið undankappingar rættiliga sannførandi - hevur ikki tapt eitt einasta talv - vunnið 16 út av 16 møguligum. Meðan Helgi kann sigast at vera favorittur at vinna FM heitið, verður kappingin sera hørð um hinar plaseringarnar. Talan er um javntsterkar, royndar og evnaríkar telvarar. Rógvi Dragaberg fer ivaleyst at gera sítt ítarsta til tess at verja FM heitið frá í fjør, umframt NM plássið hann harvið vann sær. Tó hevur Margar Berg, úr Havnar Telvingarfelag, í kappingini higartil megnað at lagt hann afturum seg.

D - bólkur: Telvarar føddir 1992-93
Hjalti T. Jógvansson úr Havnar Telvingarfelag, vann fyrru undankappingina, meðan verandi føroyameistarin í bólkinum, Rógvi Nielsen úr Sandavágs Talvfelag vann tað seinnu. Hesir báðir, umframt Rúni Vørmadal og Olaf R. Samuelsen, luttóku í NM seinast. Rúni og Olaf eru ryktir upp frá E-bólkinum. Rúni Vørmadal úr Vestmanna Talvfelag hevði eina ógvuliga góða seinnu úttøkukapping á Oyri og umdystur skuldi til, til tess at finna vinnaran. Mett verður at kappingin er sera opin og serliga 4 teir fremstu telvararnir frá undankappingunum, umframt Olaf, fara helst at gera um seg í finaluni.

E - bólkur: Telvarar føddir 1994 og seinni
E-bólkurin umboðar yngstu telvararnar, upp til 10 ára aldur. Tann bert 7 ára gamli Høgni E. Nielsen úr Sandavágs Talvfelag megnaði at vinna báðar undankappingarnar. Hann er bróður Rógva Nielsen úr D-bólkinum. Ilt er tó at meta um, hvussu FM úrslitið verður tá avtornar. Tó sýnast skyldmennirnir Høgni og Janus úr Sandavágs talvfelag at liggja væl fyri. Ongin av telvarunum hevur luttikið í NM áður.

Sí annars meira um finaluna á: www.faroechess.com.

Kaggin lagt á odda í billard

Kaggin hevur lagt seg á odda í FM kappingini í billard fyri lið

BILLARD
Tíðindaskriv

Liðið hjá Klaksvíkar Klubba má helst roknast millum favorittarnar til kappingina í ár

Kappingin byrjaði seinasta vikuskiftið, tá Havnar Klubbi vitjaði í Klaksvík og dystur var í Kagganum millum bæði kaggaliðini í 1. deild. Úrslitið gjørdist, at Kaggin 1 vann 14-4 á Kagganum 2, meðan Klaksvíkar Billardfelag vann tepurt á Havnar Klubba við 10-8.

Hetta merkir, at Kaggin 1 er á odda í kappingini við 14 stigum, Klaksvíkar Billardfelag er nr. 2 við 10 stigum, Havnar Klubbi er nr. 3 við 8 stigum og Kaggin 2 er nr. 4 við 4 stigum.

Sum tað sæst, so eru bert fýra lið við í kappingini í 1. deild í ár. Hetta er munandi minni enn undanfarin ár, tá eitt nú Tvøroyrar Klubbi, Vágs Billardfelag og Fuglafjarðar Billardfelag hava verið við. Nú eru so bert trý feløg við fýra liðum í 1. deildini, nevniliga verandi meistarar úr Klaksvíkar Billardfelag, Havnar Klubbi og so Kaggin við tveimum liðum.

Hóast Kaggin 1 hevur lagt seg á odda frá byrjan, so sigur hetta tó ikki so nógv um veruligu støðuna í kappingini. Av tí at Kaggin hevur tvey lið, so má roknast við, at annað liðið eisini fer at missa nógv stig móti so góðum liðum sum tí hjá Klaksvíkar Billardfelag og Havnar Klubba. Tó er alt ov tíðliga at gera nakrar metingar, tí tveir av spælarunum á Kagganum 2 vóru við á besta kaggaliðnum í fjør, og teir kunnu avgjørt koma at taka hini liðini á bóli.

Hyggja vit so eftir hinum liðunum, so hava vit Klaksvíkar Billardfelag, sum hevur vunnið fleiri meistaraheiti á røð. Tað manglar hesaferð ein av sínum góðum spælarum, Ólavur Kjølbro. Hann er í Danmark. Men gomlu elituspælararnir eru við, Kristian Sune Høgnesen og Sonhard Johannesen. Avloysari hjá Ólavi er ein góður spælari, sum hevur spælt fyri Fuglafjarðar Billardfelag, nevniliga Njál Petersen. Hann sleppur nú at royna seg og megnar hann at spæla upp til sítt besta, so kann væl henda, at FM-heitið aftur endar í Klaksvík.

Men taka vit so Havnar Klubba, so er verandi føroyameistarin, Henrik Petersen við á liðnum, og hann kann fáa stóran týdning fyri, hvussu kappingin fer at laga seg. Hinir báðir á "Klubbaliðnum" eru Niels Nielsen og Carsten Hansen.

Úrslitið millum hesi bæði liðini varð sum sagt, at klaksvíkingar vunnu 10-8. Og aftur hesaferð var tað Kristian Sune Høgnesen, sum skaraði framúr. Hann fekk 33,60 eygu í meðal. Hevði besta spælið uppá 900 eygu og besta umfarið uppá 160 eygu. Sonhard hevði 21 eygu í meðal og Njál 16. Á liðnum hjá Havnar Klubba spældi Henrik væl og hevði 31 eygu í meðal. Niels hevði 18 eygu í meðal og Carsten 14.

Í dystinum millum kaggaliðini vóru ikki tey stóru tølini. Bestur var Bjarni Skaalum við 21 eyg-um í meðal, Steinbjørn í Dali var næstur við umleið 18 eygum og Jan Müller við 15 eygum. Á liðnum hjá Kagganum 2 spældu Anfinnur Hansen, Heimir Ottoson og Johannes Skaarup. Teirra meðaltøl vóru rættiliga jøvn, millum 14 og 16 í meðal.

Hóast Kaggin 1 er komin best frá byrjan sigur hetta ikki nógv um útlitið. Nógv kann broytast, tá klaksvíkingar møta Kagganum 2 í Havn annað vikuskiftið, og tá Havnar Klubbi tekur ímóti Kagganum 1.

2. deild

Trý feløg eru við í 2. deild. Tey hava meldað 4 lið við. Klaksvíkar Billardfelag hevur tvey lið, Tvøroyrar Klubbi og Havnar Klubbi hava hvør sítt lið.

Bridge í framgongd

Bridge-undirvísingin mánakvøld hevur í ár upplivað metstóran áhuga

BRIDGE
Bogi Simonsen

Tað er ikki altíð, at tað gongst, sum prestur prædikar…

Tað eru nógv ár síðani at so nógv fólk hava gingið til bridge frálæru í bridgehúsinum í havn. Hvørt mánakvøld klokkan sjey møta áleið fimm borð til frálæru, har dentur verður lagdur á at spæla. Eg var eitt mánakvøld ein túr í bridgehúsinum og hugdi eftir teimum nógvu komandi stjørnunum. Vit uglur mannaðu skjótt eitt borð og byrjaðu at spæla sjálvir. Vit høvdu spælt eini 10 spøl, tá ið eg tók hesa hondina upp (er blanda við hond við borið).

Spar EKDB10976
Hjart
Rút E10987
Kleyv

Hvat skuldi eg opnað við? eg valdi at opnað við 1sp. Makkarin meldar 2kl, nú leyp eg í 3 rú, ið vísir eina sera sterka hond eini 18-19 hp. Makkarin meldar nú 4rú, hvat skal eg nú melda, 4rú er kanska besta boð, 6 sp er eisini ein møguleiki.

Makkarin hevði
Spar
Hjart KB93
Rút D
Kleyv EDB108764

Eg meldaði sum eitt býtt 7sp, ið fekk 11 stikk. Eg fór løtu seinri spentur yvir til tað borðið av næmingum, sum fekk spælið frá okkum, fyri at hyggja eftir hvussu teir høvdu klára spælið. Jú, 4sp við 12 stingum !!

Stutt eftir tók eg sum sunnan hesa hondina upp:
Spar KB976
Hjart 3
Rút 3
Kleyv E109873

Eg opnaði við pas, ið nokk er eitt mistak, betur hevði verið at opnað 1kl og síðani melda spar til sólin gerst svørt. Vestan opnaði 1nt (15-17), makkarin meldar pas og eystan meldar 2rú (transfer til hj). Nú royndi eg at koma inn í spælið við at melda 3hj (hava tit nakra avtalu um eitt slíkt meld). Makkarin meldar nú 3sp, ið allir søgdu pas til.

Makkarin hevði
Spar E10543
Hjart EK5
Rút 1082
Kleyv D2

Vit spældu 3sp við 12 stingum, eftir eitt hjartara útspæl. Eg fór aftur yvir til borðið av næmingum fyri at frætta og jú, 4sp við 12 stingum!! Kanska skuldi ein hugsað um at farið aftur á skúlabonk.

Mær hevði dáma væl at fingið eitt kjak um hesi spøl, á www.bridge.fo

Hallur vann í Klaksvík

Leygardagin varð 2.umfar av TF-vetrarkappingini avgreitt í Klaksvík

RENNING
tíðindaskriv

Veðrið var av tí besta, men undirlagið var ikki tað ein rennari er vanur við, tí tað var kavi. Hetta gjørdi kanska eisini sítt til, at úrslitið bleiv so nógv ørvísi enn tá í 1. umfar bleiv avgreitt fyri trimum vikum síðani. Startskotið bleiv latið av kl. 13.00 uttanfyri Tryggingarfelagið Føroyar og byrjaðu allir bólkar í senn. Rutan gekk niðan eftir Uppsalagøtu, Fosságøtu, norður eftir Vágsheygagøtu og oman gjøgnum Kirkjubrekkuna. Ein teinur uppá 785m. Gentur og dreingir skuldu renna 4 umfør, meðan hinir bólkarnir skuldu renna 10 umfør.

Longu fyrstu ferð rennarnir komu fram við málinum, hevði Hallur Holm úr Bragdinum lagt seg á odda, og var hann einar 30 metrar frammanfyri teir næstu, sum vóru Guttorm Sørensen, Jonhard Larsen, John Havn úr Treystinum og Sam Vang og Jóan Karl Joensen úr Bragdinum. Aðru ferð teir komu fram við málinum, hevði Hallur Holm økt munin enn meira, og var Guttorm Sørensen var eisini leysur frá hinum. Sam Vang var á triðja plássi, men hinir vóru væl við eisini. Tá tað var hálvrunnið, var Hallur Holm eini 20 sekund frammanfyri Guttorm Sørensen, sum eisini var eini 20 sekund frammanfyri teir næstu, sum nú vóru Jonhard Larsen, Jóan Karl Joensen og John Havn. Sam Vang var dragnaður heilt aftur á áttanda pláss. Fyrsta og annað plássi vóru tá avgjørd, men spennandi bleiv við triðja plássinum. Á nýggjunda umfari mátti John Havn tíverri gevast, tí hann fekk trupulleikar við maganum. Endin bleiv at Hallur Holm gjørdist tryggur vinnari, frammanfyri Guttorm Sørensen, meðan ungi kollfirðingurin Jóan Karl Joensen megnaði at vinna á Jonhardi Larsen og harvið tryggja sær triðja plássið. Sam Vang, sum vann 1. umfar av TF-vetrarkappingini, rann seg nakað frammaftur og endaði á fimta plássi. Sigrid Sivertsen úr Treystinum gjørdist vinnari hjá kvinnum og kvinnuunglingum. Jóan Karl Joensen gjørdist vinnari hjá mannsunglingum. Jan Elmar Sørensen úr Treystinum gjørdist vinnari hjá dreingjum. Bjørk H. Olsen úr Bragdinum gjørdist vinnari hjá gentum, meðan Rebekka Fuglø úr Treystinum gjørdist nummar 2 í harðari kapping við Rannvu Djurholm úr Bragdinum. Hjá veteranum gjørdist Jósvein H. Olsen úr Bragdinum vinnari, frammanfyri Tummas Joensen og Pól Sundsskarð úr Treystinum.

Eftir tvey umfør, er samlaða støðan hjá monnum tann, at er Hallur Holm á odda við 93 stigum, frammanfyri Guttorm Sørensen, sum hevur 92 stig, Sam Vang við 91 stigum og Jonhard Larsen við 90 stigum. Hjá veteranum er Jósvein H. Olsen á odda við 100 stigum, meðan Pól Sundsskarð og Tummas Joensen hava báðir 90 stig. Hjá kvinnum er Sigrid Sivertsen á odda við 100 stigum. Triðja umfar av TF-vetrarkappingini verður í Havn tann 11. desember. Tá renna tey vaksnu 12 km og børnini 4 km.

Seinna umfarið av vetrarkappingini varð runnið í røttum vetrarlíkindum